# LØGTINGIÐ



# SØGA LØGTINGSINS

Løgtingið hevur røtur meira enn 1000 ár aftur í tíðina. Fyrsta søguliga heimild, sum nevnir ting og tinghald í Føroyum, er Færeyingasaga, sum varð skrivað í Íslandi um ár 1200, men søgugranskarar halda, at Løgtingið varð sett á stovn stutt eftir norrøna landnámið um ár 800.

Heilt aftur í elstu tíð vórðu tær størstu avgerðirnar, galdandi fyri alt landið, tiknar á tinginum í Tórshavn. Í gamlari tíð varð tingið hildið á helluni úti í Tinganesi.

Umleið 1035 komu Føroyar undir Noregs kong, men søgugranskarar meta, at tann gamla tingskipanin varð varðveitt.

### 1274 - 1816

Upprunaliga hevur ting føroyinga helst verið eitt alting, har allir frælsir menn kundu møta, men tá Landslóg Magnusar Lógbøtara varð sett í gildi í 1274, varð tingið broytt til eitt Løgting.

Tingmannatalið varð sett til 36. Tingið valdi løgmann, sum kongur síðan tilnevndi. Løgtingið segði upp dóm og hevði samskifti við kong og myndugleika hansara. Kongsins umboðsmaður á tingi var fútin, sum hevði ábyrgdina av kongsins inntøkum í Føroyum. Hann var eisini almennur ákæri. Løgtingið hevði egnan skrivara, sum varð nevndur sorinskrivari. Løgtingið virkaði sum yvirrættur, og dómar, ið vórðu sagdir á vártingunum úti í sýslunum, kundu skjótast inn fyri Løgtingið.

Í 1380 komu Føroyar, sum norskt krúnland, undir danskan kong, men tær vórðu framvegis mettar at vera norskt land.

Tá Norska Lóg Kristians V varð sett í gildi í Føroyum í 1688, varð talið á løgtingsmonnum økt til 48, men hvør tingmaður kundi bara sita í eitt ár í senn. Henda skipanin bar við sær, at Løgtingið ikki fekk so roynd fólk sum fyrr, og tí minkaði týdningur tess, meðan embætisvaldið vaks. Fútin og sorinskrivarin fingu størri vald, meðan løgmansembætið smátt um smátt fánaði burtur.

### 1816 - 1852

Eftir at Noreg fór frá Danmark við friðinum í Kiel í 1814, vórðu Føroyar verandi saman við Danmark.

Í 1816 varð Føroya gamla Løgting tikið av og við tí eisini løgmansembætið. Sorinskrivarin dømdi nú einsamallur.

Føroya amt varð helst sett á stovn í 1720, men serstakur føroyskur amtmaður kom ikki fyri enn í 1816. Amtmaðurin tók einsamallur støðu til, hvørjar danskar lógir skuldu setast í gildi í Føroyum.

## 1852 - 1948

Í 1852 varð Løgtingið eftir ynski føroyinga endurreist, tó bert sum ráðgevandi stovnur hjá donsku ríkismyndugleikunum viðvíkjandi stýringini av Føroyum. Løgtingið hevði 18 valdar limir. Amtmaðurin og prósturin høvdu eisini sæti á tingi, og amtmaðurin var formaður.

Í 1906 varð tingmannatalið hækkað til 22, men aðramáta stóð henda skipanin við til 1923. Tá varð tingmannatalið broytt soleiðis, at 20 vórðu umdømisvaldir og upp til 10 eykavaldir. Samstundis fór prósturin úr tinginum, og eftir hetta valdi tingið sjálvt formannin.

## 1948 - 2005

Eftir seinna heimsbardaga var stórur meiriluti fyri eini nýskipan av Føroya støðu í ríkinum. Eftir samráðingar millum umboð fyri Løgtingið og donsku stjórnina varð fólkaatkvøða 14. september í 1946. Veljararnir skuldu velja ímillum antin eitt ógvuliga avmarkað heimastýri ella loysing frá Danmark. Úrslitið var ein tepur meiriluti fyri loysing, men ósemja tók seg upp um tulkingina av úrslitinum – um hon var vegleiðandi ella bindandi. Eftir løgtingsvalið í 1946 og nýggjar tingingar við danir varð Heimastýrislógin sett í gildi í 1948.











Eftir hetta broyttist virksemið hjá Løgtinginum munandi. Meðan tað higartil bert hevði verið ráðgevandi, fekk tað nú innan karmar Heimastýrislógarinnar lóggávuvald í yvirtiknum sermálum. Í Heimastýrislógini eru málsøkini býtt sundur í A-mál og B-mál. A-mál eru føroysk sermál og kunnu yvirtakast, um antin heimastýrið ella ríkisstýrið vil tað. B-mál kunnu yvirtakast, um heimastýrið og ríkisstýrið í samráðingum semjast um, at so skal verða. Verjumál og uttanríkismál liggja uttan fyri Heimastýrislógina. Í øllum málum, uttan yvirtiknum sermálum, liggur lóggávuvaldið hjá Fólkatinginum, har føroyingar eiga tvey umboð. Sambært Heimastýrislógini ræður Løgtingið fyri Stýrisskipan Føroya og fyri Tingskipanini.

Útinnandi vald í sermálum hevur landsstýrið, sum er skipað við løgmanni og landsstýrismonnum. Í øllum øðrum málum er útinnandi vald hjá donsku stjórnini. Tó kann heimastýrið eftir samráðingar við ríkisstýrið yvirtaka fyrisitingina av felagsmálum. Í Føroyum er ríkisstýrið umboðað av ríkisumboðsmanninum. Hann hevur stjórnarinnar vegna møti- og talurætt í Løgtinginum, men ikki atkvøðurætt.

Hvussu heimastýrið skipar seg innanhýsis, er eitt yvirtikið sermál. Hetta er gjørt við løgtingslóg nr. 103 frá 26. juli 1994 um Stýrisskipan Føroya. Eftir hesi lóg § 1 er valdsbýtið í Føroyum soleiðis, at lóggávuvaldið í yvirtiknum málum er hjá Løgtinginum og løgmanni í felag, útinnandi valdið hjá landsstýrinum, meðan dómsvaldið í slíkum málum liggur hjá dómstólum ríkisins.

Í Løgtinginum, sum verður valt fyri 4 ár í senn, sita í mesta lagi 33 tingmenn, sum verða valdir á almennum, loyniligum og beinleiðis vali. Í landsstýrinum sita løgmaður og minst 2 landsstýrismenn. Løgmaður verður tilnevndur óbeinleiðis av Løgtinginum á tann hátt, at løgtingsformaðurin, eftir at hava fingið frágreiðing frá floksformonnunum, leggur fyri Løgtingið uppskot, sum atkvøtt verður um. Atkvøður meir enn helmingurin av øllum tingmonnum ímóti uppskotinum, er tað fallið. Annars er tað samtykt. Løgmaður setir og loysir úr starvi landsstýrismenninar. Hvørki løgmaður ella landsstýrismaður kann verða sitandi í sessi sínum, um so er, at Løgtingið við atkvøðugreiðslu, har helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri, hevur samtykt, at tað ikki longur hevur álit





á løgmanni ella avvarðandi landsstýrismanni. Løgmaður kann, eins væl og Løgtingið, nær ið vera skal, skriva út val til Løgtingið.

Tingmannaskipanin var óbroytt frá 1923 til 1978. Tá varð Løgtingsvallógin broytt soleiðis, at veljast skuldu 27 umdømisvaldir tingmenn og upp til 5 eykavaldir.
Løgmaður og landsstýrismenn kunnu ikki hava sæti á tingi. Teir hava uppskots- og talurætt, men ikki atkvøðurætt.

Í 2007 varð Løgtingsvallógin frá 1978 broytt soleiðis, at Føroyar gjørdust eitt valdømi, og tingmannatalið varð økt til 33.

**2005 –**

Í mai 2005 vórðu tvær lógir og tvey ríkislógartilmæli samtykt, sum eru ískoyti og/ella broytingar til Heimastýrislógina.

Onnur lógin er lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka, sum er ein dagføring av §§ 2 og 3 í Heimastýrislógini og harvið eisini lista A og lista B.

Í § 1 eru nevnd tey mál, ið ikki kunnu yvirtakast, og tey eru stjórnarskipan danska ríkisins, heimarætt danska ríkisins, hægstarætt danska ríkisins, uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkur og gjaldoyra- og peningapolitikkur.

Sambært § 2 kunnu ávís mál yvirtakast eftir samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar. Øll onnur mál kunnu yvirtakast, tá føroyingar ynskja tað.

Hin lógin er lóg um altjóðarættarligar sáttmálar Føroya landsstýrisins at gera. Lógin gevur innan ávísar karmar Føroya landsstýri rætt at gera sáttmálar innan tey málsøki, sum eru yvirtikin. Harumframt inniheldur lógin áseting um limaskap Føroya í millumtjóða felagsskapum.

# UMBOÐANIN Á TINGI

Sjey flokkar eru umboðaðir á tingi. Eitt eyðkenni fyri føroyskan politikk er, at hann gongur eftir tveimum ásum: einum tjóðskaparligum í spurninginum millum Føroyar og Danmark og einum hugmyndafrøðiligum frá vinstru til høgru.

Føroyska flokkaskipanin hevur sín uppruna í teirri spjaðing, sum eftir 1900 kom í føroysku tjóðskaparrørsluna, ið tók seg upp í seinasta fjórðingi av 19. øld.

**Nýtt Sjálvstýri**, sum varð formliga stovnað í 1909, men fekk umboð á tingi í 1906, vildi geva Løgtinginum størri vald í føroyskum viðurskiftum og geva føroyskum somu rættindi sum danskt sum skúlamál, kirkjumál og í øllum almennum viðurskiftum.

**Sambandsflokkurin** varð stovnaður í 1906 og er ein liberalur flokkur, sum virkar fyri eini støðugari og frísinnaðari menning av Føroya fólki, búskaparliga, mentanarliga og stjórnarliga. Flokkurin gongur inn fyri, í ríkisfelagsskapi við Danmark, at reka ein framburðssinnaðan politikk á øllum økjum.

**Javnaðarflokkurin**, stovnsettur 1925, er ein óheftur sosialdemokratiskur flokkur. Flokkurin vil á fólkaræðisligum grundarlagi byggja sín politikk á, at alt samfelagsgagnligt virksemi má skipast út frá umsorgan fyri felags áhugamálum og fyri at fremja vælferð fólksins. Øll menniskju skulu hava somu rættindi at taka lut í arbeiðinum fram móti størri vælferð og einum frælsum lívi.

**Fólkaflokkurin**, stovnaður í 1940, virkar á kristnari grund fyri politiskum sjálvstýri og búskaparligum sjálvbjargni, so hvør familja og einstaklingur hava frælsi til, eftir evnum, vilja og undir ábyrgd, at leggja egin viðurskifti til rættis í skipaðum rættarligum og sosialum kørmum og við sum minst av almennari uppílegging og skattatrýsti.

**Tjóðveldi** varð stovnað í 1948. Flokkurin vil stovnseta føroyskt tjóðveldi. Politikkurin er grundaður á, at fólkaræði skal galda í øllum viðurskiftum í føroyska samfelagnum.

Flokkurin vil, at Føroyar skulu taka lut í altjóða samfelagnum sum sjálvstøðug tjóð við bæði rættindum og skyldum.

**Miðflokkurin** varð stovnaður 1992 og byggir politikk sín á kristnu læruna. Flokkurin virkar fyri, at kristna lívsáskoðanin skal eyðkenna samfelagið, og at tær politisku avgerðir, sum tiknar verða, eru í samsvari við hesa.

**Framsókn** varð stovnað í 2011, sum ein liberalur tjóðskaparflokkur. Flokkurin byggir sín politikk á ta sannføring, at persónligt frælsi, vinnuligt frælsi og tjóðskaparligt frælsi eru grundleggjandi virði, ið skulu fáa føroyska samfelagið aftur á beint. Frælsið hjá fólki og landi gevur sjálvsálit, fremur virkishug og stimbrar skapanarevni. Tí er frælsi tað, sum flokkurin setir ovast í øllum sínum politiska virksemi.

# VAL TIL LØGTINGIÐ

Løgtingið verður valt fyri 4 ár í senn. Løgtingsval kann tó vera, áðrenn valskeiðið er úti, um løgmaður ger av at skriva út val, ella um tingið samtykkir at upploysa seg sjálvt. Løgmaður sendir síðan út kunngerð um val og ásetir valdagin, við í minsta lagi 4 viku freist og í mesta lagi 5 viku freist.

**Løgtingsvalið 1. september 2015**

Atkvøðurætt: 36.459. Greiddu atkvøðu: 32.374
Vallutøka 88,8%.

| | Atkvøður | % | Tingmenn |
|---|---|---|---|
| Fólkaflokkurin (A) | 6.102 | 18,8 | 6 |
| Sambandsflokkurin (B) | 6.046 | 18,7 | 6 |
| Javnaðarflokkurin (C) | 8.093 | 25,0 | 8 |
| Nýtt Sjálvstýri (D) | 1.305 | 4,0 | 2 |
| Tjóðveldi (E) | 6.691 | 20,7 | 7 |
| Framsókn (F) | 2.241 | 6,9 | 2 |
| Miðflokkurin (H) | 1.779 | 5,5 | 2 |

Valrættar- og valbærisaldurin er 18 ár.



## Løgtingssetan

Løgtingið verður sett ólavsøkudag 29. juli. Tá fara tingmenn, landsstýrismenn, ríkisumboðsmaður og embætismenn í skrúðgongu úr tinghúsinum í Havnar Kirkju. Eftir gudstænastuna verður gingið niðan aftur í tinghúsið, har tingið verður sett. Á hesum fundi heldur løgmaður ólavsøkurøðuna, har hann viðger støðuna í samfelagnum. Tingið umrøður løgmansrøðuna í fyrstu viku í august. Í hesum orðaskifti verður støðan í samfelagnum sum heild viðgjørd.

Løgtingið viðger vanliga millum 150 og 200 mál í eini tingsetu, men málini eru ógvuliga ójøvn bæði til støddar og av týdningi. Tingsetan er frá ólavsøku til ólavsøku.

Uppskot til løgtingsfíggjarlóg skal leggjast fram innan 1. oktober og skal vera samtykt innan 31. desember. Uppskot, sum skulu vera liðugt viðgjørd fyri ólavsøku, kunnu ikki, uttan í serligum førum, verða framløgd seinni enn 7. mars á hvørjum ári. Øll uppskot, sum ikki eru liðugt viðgjørd á ólavsøku, fella burtur og mugu leggjast fram av nýggjum, skulu tey hava viðgerð.







# LØGTINGSFORMAÐURIN OG FORMANSSKAPURIN

Høvuðsuppgávan hjá Løgtingsformanninum er at tryggja, at reglur í Stýrisskipanarlógini, sum viðvíkja Løgtinginum, og reglurnar í Tingskipanini verða hildnar.

Løgtingsformaðurin og 3 varaformenn verða valdir á fyrsta tingfundi eftir, at val hevur verið. Formansskapurin situr alt valskeiðið. Formansskapurin tekur avgerð í øllum týðandi málum, ið víðvíkja tinginum.

## Umsiting tingsins

Undir leiðslu stjórans hevur umsiting tingsins um hendi eina røð av uppgávum fyri løgtingsformannin, formansskapin og løgtingsmenn.



Páll á Reynatúgvu
*løgtingsformaður (E)*



Heðin Mortensen
*1. næstformaður (C)*



Johnhard Klettheyggj
*stjóri*



Edmund Joensen
*2. næstformaður (B)*



Jógvan á Lakjuni
*3. næstformaður (A)*

# TINGNEVNDIR

Løgtingið hevur 7 fastar nevndir, sum sambært Tingskipanini verða valdar fyri alt valskeiðið, uttan so er, at tingið samtykkir, at nevndirnar skulu veljast av nýggjum.

**Fíggjarnevndin** veitir eykajáttanir sbrt. § 44, stk. 2 í Stýrisskipanarlógini og gevur annars Løgtinginum tilmæli í fíggjar-, búskapar-, skatta- og avgjaldsmálum.

**Uttanlandsnevndin** gevur landsstýrinum tilráðingar í uttanlandsspurningum sbrt. § 54 í Stýrisskipanarlógini og gevur annars Løgtinginum tilmæli í øllum uttanlands-, markna- og verjumálum, eisini um viðurskiftini við Danmark.

**Vinnunevndin** gevur Løgtinginum tilmæli í fiskivinnu-, sjóvinnu-, fiskiídnaðar- og øðrum ídnaðarmálum, alivinnu-, landbúnaðar-, samskiftis-, oljuvinnu- og handilsmálum. Hon gevur eisini tilmæli viðvíkjandi partafeløgum, skrásetingum o.ø.m.

**Trivnaðarnevndin** gevur Løgtinginum tilmæli í almanna-, heilsu-, javnstøðu- og bústaðarmálum.

**Mentanarnevndin** gevur Løgtinginum tilmæli í útbúgvingar-, menta-, miðla- og kirkjumálum.

**Rættarnevndin** gevur Løgtinginum tilmæli í rættar-, samferðslu-, orku-, arbeiðsmarknaðar-, umhvørvis- og kommunumálum.

**Landsstýrismálanevndin** hevur rættarligt eftirlit við, at løgmaður og landsstýrismenn halda lóggávuna. Hon røkir starv sítt sbrt. § 38 í Stýrisskipanarlógini. Nevndin hevur heimild at boðsenda løgmanni ella landsstýrismanni at koma á fund at greiða frá ávísum máli.

Umframt tær føstu nevndirnar kann tingið eisini samtykkja at seta aðrar nevndir at viðgera ávís mál.

# ARBEIÐSHÁTTUR LØGTINGSINS

Tingið starvar eftir teim formligu reglum, sum ásettar eru í Stýrisskipanarlógini og Tingskipanini.

*Tað eru 5 ymisk sløg av løgtingsmálum:*

1. Uppskot til løgtingslóg
2. Uppskot til ríkislógartilmæli
3. Uppskot til samtyktar
4. Frágreiðingar, skrivligir, munnligir ella ófráboðaðir fyrispurningar
5. Misálit á løgmann ella landsstýrismenn

Bara løgmaður, landsstýrismaður ella løgtingsmaður kunnu leggja fram mál í Løgtinginum. Nevndirnar kunnu, um í minsta lagi 5 limir ynskja tað, seta løgmanni ella landsstýrismanni skrivligar spurningar um ávís viðurskifti og í hesum sambandi biðja um skrivligt svar, ella at løgmaður ella landsstýrismaður kemur á fund at svara spurningunum. Tingmaður kann eisini seta løgmanni ella landsstýrismanni skrivligan spurning, sum verður svaraður beinleiðis og uttan viðgerð í Løgtinginum.

Skrivar borgari ella felag Løgtinginum bræv um eitthvørt, so verður hetta ikki tikið til viðgerðar uttan so, at løgtingsmaður tekur málið upp sum løgtingsmál.

## Uppskot til løgtingslógir

Uppskot til løgtingslóg skal fyri á fýra ymiskum tingfundum. Harumframt fær málið nevndarviðgerð í løgtingsnevnd.









*Framløga*

Løgtingslógaruppskot er framlagt, tá løgtingsformaðurin á tingfundi boðar frá tí av tingsins røðarapalli. Eintak av uppskotinum verður latið hvørjum tingmanni talgilt í seinasta lagi sama dag. Á framløgufundinum verður málið ikki umrøtt, og kann heldur ikki beinast í nevnd.

*1. viðgerð*

Uppskot kann fáa 1. viðgerð 2. yrkadagin eftir framløgu. Við 1. viðgerð verður uppskotið umrøtt í síni heild. Broytingaruppskot kunnu verða fráboðað og umrødd.

*Nevndarviðgerð*

Eftir 1. viðgerð fáa málini vanliga nevndarviðgerð. Tað er løgtingsformaðurin, ið ger av, um mál skal beinast í nevnd, og hvørja nevnd tað skal í. Nevndin skrivar tinginum álit, og samd nevnd, meirilutin og minnilutar í nevndini kunnu seta fram broytingaruppskot. Vanliga fáa mál bara nevndarviðgerð millum 1. og 2. viðgerð. Tingið kann tó á øðrum viðgerðarstigum samtykkja at beina mál aftur í nevnd. Undir nevndarviðgerðini granska nevndarlimirnir uppskotið gjøllari og fáa til vega eyka upplýsingar frá almennum og privatum, og í summum førum kallar nevndin eisini fólk inn á fund at fáa tey at siga sína hugsan um uppskotið.

*2. viðgerð*

2. viðgerð kann vera 3. yrkadagin eftir, at 1. viðgerð endaði, tó ikki fyrr enn 2. dagin eftir, at møguligt nevndarálit er lagt fram. Tingmaður kann skrivliga seta fram broytingaruppskot, men skal tað vera gjørt, áðrenn orðaskiftið við 2. viðgerð er byrjað. Nevndin, meirilutin ella minniluti kunnu eisini skrivliga seta fram broytingaruppskot, eftir at 2.

viðgerð er byrjað, men áðrenn orðaskiftið er endað. 2. viðgerð endar við atkvøðugreiðslu. Fellur uppskotið, steðgar viðgerðin her.

*3. viðgerð*
3. viðgerð kann vera 2. yrkadagin eftir, at 2. viðgerð endaði, ella eftir at møguligt nevndarálit er lagt fram. 4 tingmenn kunnu í felag skrivliga seta fram broytingaruppskot, og um málið er beint í nevnd við 2. ella 3. viðgerð, so kann nevnd, meiriluti ella minniluti í nevndini skrivliga seta fram broytingaruppskot. Broytingaruppskot kann leggjast fram við 3. viðgerð, áðrenn orðaskiftið byrjar. Við 3. viðgerð verða broytingaruppskot og tær greinar, broytingaruppskotið viðvíkir, umrødd fyrst og koma fyrst til atkvøðugreiðslu. Eftir hetta verður endalig viðgerð, tá tingið samtykkir ella fellir uppskotið.

*Staðfesting og kunngerð*
Sjálvt um Løgtingið hevur samtykt løgtingslógaruppskot, so er tað ikki bindandi fyri borgaran. Tað gerst tað ikki, fyrr enn løgmaður hevur staðfest uppskotið sum løgtingslóg og kunngjørt tað í Kunngerðablaðnum. Løgmaður hevur fullan rætt at nokta at staðfesta uppskotið, og tá verður so eingin løgtingslóg. Men í flestum førum staðfestir hann uppskotið, tí annars fær hetta helst ta avleiðing, at tingið noyðir hann frá sum løgmann.

## Uppskot til ríkislógartilmæli
Uppskot til ríkislógartilmæli verða viðgjørd á sama hátt sum uppskot til løgtingslógir. Einasti munur er, at endaliga úrslitið verður ikki kunngjørt alment, men harafturímóti fráboðað ríkismyndugleikunum av løgmanni. Tað samtykta uppskotið er ikki bindandi fyri borgaran, fyrr enn tað er sett í gildi av donskum myndugleikum.

## Uppskot til samtyktar
Hesi mál verða viðgjørd sum uppskot til løgtingslógir. Tó enda hesi mál eftir atkvøðugreiðsluna við 2. viðgerð og skulu ikki staðfestast og kunngerast av løgmanni. Uppskot til samtyktar eru ikki løgfrøðiliga bindandi, hvørki fyri landsstýrið ella borgaran. Í onkrum førum krevst tó eftir Stýrisskipanarlógini, at ein tingsamtykt skal til, fyri at landsstýrið kann gera eitthvørt, eitt nú gera týdningarmiklar sáttmálar við onnur lond.

### Frágreiðingar, skrivligir, munnligir ella ófráboðaðir fyrispurningar

Tað, sum eyðkennir hesi tingmál, er, at Løgtingið onga niðurstøðu ger. Málið verður umrøtt á tingi, og so er liðugt, eingin atkvøðugreiðsla og eingin nevndarviðgerð. Við hesum viðgerðarháttum kann løgtingsmaður fáa allar tær upplýsingar, hann hevur fyri neyðini, frá løgmanni, landsstýrismanni ella ríkisumboðsmanninum, og út frá hesum gera sær sínar politisku niðurstøður um, hvat ið hann ætlar.

### Misálit

Eftir Stýrisskipanini er tað so, at løgmaður og landsstýrismenn eru óheftir av Løgtinginum. Løgmaður tilnevnir landsstýrismenninar, meðan løgtingsformaðurin tilnevnir løgmann, um ikki 17 tingmenn eru ímóti løgmansevni løgtingsformansins. Løgmaður og landsstýrismenninir eru tó ikki óheftari enn so, at um so er, at 17 tingmenn eru ímóti einum av teimum, so mugu teir leggja frá sær. Mál um misálit á løgmann ella landsstýrismann verða bert viðgjørd á einum tingfundi. Uppskot um hetta verður skrivliga lagt fram av løgtingsmanni og alt fyri eitt tikið til umrøðu í tinginum, og beint eftir umrøðuna verður atkvøðugreiðsla.

### Tingfundir

Løgtingsfundir eru almennir.



Løgtingið hevur røtur meira enn 1000 ár aftur í tíðina. Síðan 1948 hevur Løgtingið havt lóggávuvald á málsøkjum, sum eru yvirtikin sum føroysk sermál eftir Heimastýrislógini. Føroya landsstýri hevur útinnandi valdið á hesum málsøkjum.

Løgtingið verður valt fyri 4 ár og hevur 33 tingmenn. Síðan 2007 hava Føroyar verið eitt valdømi. Sjey flokkar hava umboð í Løgtinginum



MYNDIR: INGI JOENSEN, MARTIN SIRKOVSKY, JENS KRISTIAN VANG OG ÓLAVUR FREDERIKSEN UPPSETING OG PRENT: FØROYAPRENT

Tinghúsvegur 1-3 Postboks 208 110 Tórshavn Føroyar
Tel. 36 39 00 logting@logting.fo www.logting.fo